YRKIS nevndafyrisitingin

Hoyviksvegur 72
Postsmoga 3279
FO-110 Tórshavn

Telefon +298-30 65 60
Telefaks +298-30 65 64

**Faroe Maritime Service**
**Sundsvegur 11**
**100 Tórshavn**

**Dagfest**: 22. oktober 2013
**Tygara ref.**:
**Máltal.**: 13/00316-4
**Viðgeri:** Janus á Ryggi

Vísandi til umsókn tygara um læruplássgóðkenning, dagfest 23. september 2013, verður við hesum sagt frá, at yrkisnevndin góðkennir

**Faroe Maritime Service,** sum lærupláss innan skrivstovu við fyrisiting sum sergrein.

Læruplássgóðkenningin er frá 02.10.2013 at rokna og varar í 5 ár, men kann góðkenningin takast upp til nýggja viðgerð.

Læruplássgóðkenningin er treytað av:

1. at yrkislært fólk við samsvarandi útbúgving og minst 3 ára arbeiðsroyndum, sum kann standa fyri upplæringini, er á staðnum ella er tøkt fulla tíð,
2. at virki javnan fremur allar ella tær týdningarmestu arbeiðsuppgávurnar, sum hoyra til yrkisgreinina,
3. at virki hevur ta útgerð, sum er neyðug fyri at kunna útinna arbeiðsuppgávurnar sambært pkt. 2, og
4. at virki lýkur treytirnar um arbeiðsumhvørvi, sum eru ásettar í lógum og reglum.

Um broytingar henda á læruplássinum eftir at hendan góðkenningin er latin, sum kunnu ávirka upplæringarumstøðurnar, hava tygum skyldu at boða Yrkisdeplinum frá hesum.

Góðkenning av lærupIássi kann takast aftur, um avgerandi fyritreytir fyri góðkenningini detta burtur, t.v.s. um virki ikki lýkur treytirnar fyri verkligu læruna, ið eru ásettar í útbúgvingarkunngerðini.

Hjálagt er yrkisútbúgvingarlógin, reglugerðin um góðkenning av læruplássum og útbúgvingarkunngerðin.

Hvørja ferð nýggjur lærlingur verður tikin í læru, skulu tygum kunna lærlingin um útbúgvingarreglurnar og lógargrundarlagið fyri lærusáttmálanum og útbúgvingini, og geva lærlinginum eitt eintak av hesum tilfari, áðrenn lærusáttmáli verður skrivaður.

Viðvíkjandi tí til læruna hoyrandi skúlagongd verður gjørt vart við, at tá lærupIássi hevur móttikið góðkenda lærusáttmálan frá Yrkisdeplinum, skal lærupIássi innskriva lærlingin til góðkendan yrkisskúla.

Janus á Ryggi

***Vinaliga heilsan,***
***Janus á Ryggi***
***Yrkisnevndarskrivari***